## Príshækking á kopiheilivági

Framleiðararnir av kopiheilivági hava nýtt várið til at hækka prísirnar munandi innan fleiri sjúkur. Millum annað er prísurin á heilivági móti ov høgum blóðtrýsti, ov høgum kolesteroli og móti magasári farin nógv upp. Hetta merkir, at útreiðslurnar hjá bæði tí almenna og hjá sjúklingunum fara upp. Príshækkingarnar hjá framleiðarunum standa í andsøgn við prísavtaluni, sum limirnir há Lif hava við innanríkis- og sunnheitsministaran í Danmark, Lars Løkke Rasmussen. Hendan avtalan heldur písunum á ektaðum heilivági í stað.




## Summardáar

Heine Hestoy er ein av teimum fáu í Føroyum, sum hevur skrivað ungdómsbøkur. Bókin Summardáar kom út á fyrsta sinni í 1995 og hevur leingi verið útseld. Hóast tólv ár eru liðin, síðani bókin kom út, hevur hon verið nógv lisin, serliga í skúlunum. Tí hevur Bókadeildin gjørt av at geva hana út aftur. Søgan er um kærleika og sjalusi, og um hvussu nógv alt kann broytast, tá ið tú hevur verið leingi til skips og følir teg fremmandan, tá tú kemur heim. Heine Hestoy, sum sjálvur hevur siglt, síðan hann var blaðungur, dugir væl at lýsa lívið umborð á báti, og hvussu tað er at vera ungur og óroyndur millum vaksnar menn.

# Reint marglæti



*Pearl eitur snøggi báturin, sum leirvíkingarnir hava keypt. Her avmyndaður í Nólsoy, tá undirritaði varð avheintaður*

**Saman við tveimum øðrum hava Langgaard brøðurnir úr Leirvík keypt ein stuttleikabát úr Póllandi, sum teir ætla at nýta til ferðavinnuendamál. At báturin er væl egnaður, er eingin ivi um**

FERÐAVINNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Her okkara egni Rólant, sum roynir seg við bowlingkúluni. Stjórin sjálvur er eisini til reiðar at gera sítt besta*

Hann sær gott út.

Og hann er eisini góður í allar mátar. Pearl eitur hann, og hann er ætlaður at sigla við ferðafólki. Og hann er sum skaptur til tað, tí hann er snøggur, væl innrættaður og siglir 35 míl við mestu ferð.

Vit vóru øll við. Starvsfólkini á Sosialinum. Skuldu til housewarming í Leirvík. Ferðin gekk væl, løgdu at inni á Toftum eftir tveimum starvsfólkum, og løgdu síðani leiðina norðureftir.

Veðrið var av tí besta, men av tí, at báturin gekk so skjótt, trampaði eitt sindur við hvørt, og tað dámdi ikki øllum. Men súpanin kom væl við, og tað bøtti munandi um lagið.

Pearl, sum er 44 føtur langur, bar seg ógvulia væl, og eingin trupulleiki er at liggja nátt umborð, tí báturin hevur ikki færri enn trý kømur við dupultkoyggjum. Ella kahúttir, sum tað eitur.

Komnir til Leirvíkar stóð Snoddi, reportagubussurin hjá Sosialinum, fyri okkum. Tað var – sum vera man – Snorri og Jens Kristian, sum vóru á ferð, og so fraktaðu teir okkum onnur niðan í bowlinghøllina í Leirvík, har næstu tveir tímarnir gingu.

Synd er at siga, at øll raktu líka væl hesar keylurnar. Ofta og títt endaði kúlan í rennuni, men tað var kanska ikki annað væntandi, og lagið gjørdist í hvussu er ikki verri av tí. So høgt gongur eingin upp í tað.

Hvør vann stendur eitt sindur »hen í tað óvissa«, men eingin helt seg tapa, og so er væl einki betri enn tað.



*Jón Tórur kann annað enn at bróta Sosialin um. Stílurin finst ikki betri, men um hann vann, er ein onnur søga. Til høgru Gudny Langgaard, ið er systir til tríggjar av eigarunum og sum var vertur fyri túrinum*

Leiðin gekk síðani niðan í nýggju húsini hjá Gudny Langgaard og familju hennara, har borðreitt var við alskyns mati, føroyskum eins væl og útlendskum. Lagið var gott, hýrurin góður og prátið gekk av tí allarbesta. Og øll vóru samd um, at í Leirvík er gott at vera – eisini um LÌF kanska hevur sæð betri dagar.